# *Lóg fyri Bogaskjótisamband Føroya*

Grein 1: Bogaskjótisamband Føroya (BSKF) er samgonga við øllum feløgum innan ÍSF, sum íðka bogaskjóting.

1. BSKF hevur hægsta myndugleika í øllum bogaskjótiviðurskiftum.
2. BSKF hevur við starvsnevndarformanni sínum sætið í stjórn ÍSF's.
3. BSKF hevur fullan limaskap í altjóða bogaskjótifelagsskapinum World Archery (WA), evropeiska bogaskjótifelagsskapinum WAU og norðurlendsku samstarvsuniónini NBU.

Grein 2: BSKF hevur til endamáls at menna og skapa áhuga fyri bogaskjóting í Føroyum, og at vera stuðul hjá feløgum í samarbeiði sínámillum.

1. BSKF hevur til endamáls at umboða bogaskjóting í Oyggjaleika, Norðurlanda og alheims samstarvi annars.

Grein 3: Ítróttarfeløg, ið eru limir í ÍSF og íðka bogaskjóting, skulu gerast limir í BSKF.

1. Umsókn um limaskap verður skrivliga at senda til BSKF, sum avgerð um felagið kann gerast limur.
2. Útmeldan av felag verður eisini at senda skrivliga til BSKF. Annars verður víst til lógir ÍSF.

Grein 4: Aðalfundurin verður hildin á mars/apríl mánað.

1. Aðalfundurin skal verða fráboðaður skrivliga til feløgini, starvsnevnd, starvsnevnd ÍSF, dómsnevnd og grannskoðara hjá BSKF og verða lýstur í bløðunum 14 dagar undan aðalfundinum.
2. Aðalfundarskrá:
    - Val av orðstýrara.
    - Starvsnevndarformaðurin greiður frá virki BSKF's í farna ári.
    - Framløga av grannskoðaðum roknskapi.
    - Val av nevndum, tiltakslimum og grannskoðara.
    - Innkomin mál
    - Ymiskt.

Grein 5: Møta á aðalfundi kann felag, sum hevur verið limur í BSKF í minsta lagi ein mánað og hevur limagjalds- og onnur viðurskifti síni í lagi.

1. Møta á aðalfundi kann starvsnevndin, dómsnevndin, starvsnevnd og grannskoðari hjá ÍSF og aðrar nevndir skipaðar undir BSKF.
2. Feløg, sum lúka tær treytir, ið eru í grein 5, kunnu senda í mesta lagi trý umboð at møta á aðalfundi.

Grein 6: Atkvøðurætt á aðalfundinum við einari atkvøðu í part hava: feløgini og hvør starvsnevndarlimur í BSKF.

1. Dómsnevndin, starvsnevnd og grannskoðarin í ÍSF hava talurætt og rætt at seta fram uppskot á aðalfundinum, tó í samsvar við tær treytir, sum eru í grein 7.

Grein 7: Á aðalfundinum kunnu lógaruppskot ikki verða viðgjørd ella lógarbroytingar gjørdar uttan so, at tað er tilskilað í fundarskránni.

1. Uppskot til lógarbroyting, uppskot til nevndarlimir, sum feløgini og starvsnevndin ætlað at skjóta upp á aðalfundinum sambært grein 9.1 og uppskot hjá feløgunum til álitisstarv sambært grein 9.4 og 9.5, skulu vera starvsnevndini í hendi í seinasta lagi 7 dagar fyri aðalfundin.
2. Uppskot um lóg og lógarbroytingar skulu vera starvsnevndini í hendi í seinasta lagi 7 dagar fyri aðalfundin. Uppskotini verða at senda feløgunum í seinasta lagi 4 dagar fyri aðalfundin.
3. Fyri at uppskot skal vinna fram á aðalfundinum, skal meira enn helmingurin av teimum møttu, sum hava atkvøðurætt, atkvøða fyri.
4. Stendur á jøvnum, er atkvøða starvsnevndarformansins avgerandi.

5. Mál, ið ikki standa á fundarskrá til aðalfund og ikki snúgva seg um lógarbroyting ella skipan av sambandinum, kunnu verða tikin til viðgerðar og avgjørd, um 2/3 av umboðaðu feløgunum játta.

Grein 8: Eykaaðalfundur skal verða hildin, um nevndin ynskir tað, ella um helvtin av feløgunum ynskja tað. Hann skal vera lýstur við dagsskrá og í samsvari við aðalfundarreglugerðirnar.

1. Á eykaaðalfundi kunnu uppskot ikki verða viðgjørd, uttan tey standa á fundarskrá.
2. Fyri at uppskot skal vinna sømdir á eykaaðalfundi, skal meiri enn helvtin av teimum møttu atkvøða fyri.
3. Eykaaðalfundur skal verða lýstur við dagsskrá og annars eftir reglunum um vanligan aðalfund.

Grein 9: Hægsti myndugleiki BSKF's er aðalfundurin. Dagligu leiðsluna av BSKF hevur starvsnevndarformaðurin.

1. Í starvsnevndini sita formaður, næstformaður og nevndarlimur. Teir verða valdir einsæris á aðalfundinum fyri eitt tvey ára skeið. Tveir verða valdir annað hvørt ár og ein annað hvørt ár. Valdur verður ein tiltakslimur fyri eitt ár.
2. Starvsnevndin hevur í dagliga virkinum hægsta valdið í BSKF og hevur m.a. øll fíggjarlig viðurskifti um hendi. Til keyp og sølu av fastari ogn krevst tó aðalfundarsamtykt.
3. Starvsnevndin kann seta kassameistara, sum ikki nýtist at vera starvsnevndarlimur.
4. Starvsnevndin hevur heimild at seta undirnevndir at taka sær av ávísum starvsøki, um neyðugt við limum uttan fyri BSKF og ÍSF. Hvørt limafelag skal yvir fyri starvsnevndini útnevna ein av sínum limum, sum skal kunna átaka sær eitthvørt álitisstarv innan BSKF. Í seinasta lagi ein mánað eftir aðalfundin, skal starvsnevndin hava fullmannað undirnevndirnar.
   Reglugerð um virksemi hjá undirnevndum skal gerast av starvsnevndini.
5. Undirnevndirnar, sum verða útnevndar av starvsnevndini, skipa seg við einum starvsnevndarlimi sum formanni.
6. Undirnevndirnar hava fulla ábyrgd av sínum egna øki.
7. Undirnevndirnar taka avgerð í trætumálum innanfyri sítt egna øki.
   Starvsnevndin avgerð, um ósemja er. Starvsnevndin kann taka mál til viðgerðar eftir áheitan frá undirnevndum, ið ikki kunnu loysa málið, ella av sínum eintingum.
   Starvsnevndin hevur heimild at broyta avgerðir, ið tiknar eru av undirnevnd.
8. Nevndarlimir fáa onga løn fyri størv síni.
9. Starvsnevndin skal einaferð um árið senda ÍSF frágreiðing um virki sambandsins.
10. BSKF skal kunna onnur sersambond/deildir undir ÍSF og ÍSF um altjóða stevnur, sum skulu verða í Føroyum.

Grein 10: Formaður BSKF's boðar til fundar í starvsnevndini.

1. Starvsnevndarfundur verður lýstur við í minsta lagi 7 daga freist.
2. Boðast skal til fundar í starvsnevndini, um 1/3 av limum hennara skrivliga krevja tað.
3. Formaðurin stýrir fundunum.
4. Mál verða avgjørd við vanligum meiriluta.
5. Ferðaútreiðslur hjá nevndarlimum rindar BSKF.

Grein 11: BSKF er óheft av politiskum og átrúnaðarligum áhugamálum.

Grein 12: Fíggjarliga grundarlagið í BSKF er inntøka av ymiskum kappingum, luttøkugjald og partur tillutaður frá ÍSF av landskassastudningi o.s.fr..

1. Roknskaparár BSKF's er álmanakkaárið.

Grein 13: Luttaka í FM-kappingum og á landsliði kunnu tey, sum lúka tær reglur, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi hjá ÍSF og alheims felagsskapinum World Archery (WA).

Grein 14: Uppskot um avtøku av BSKF skal verða lagt fram á aðalfundi, og skal tá, fyri at vinna sømdir, samtykkjast við í minsta lagi ¾ av teimum, ið møtt eru og skulu í minsta lagi ¾ av limunum vera hjástaddir.

1. Møguligar ognir falla til skjótiítróttin í landinum ella verða á annan hátt nýttar ítróttinum at gagni.

Samtykt á aðalfundi hjá Bogaskjótisamband Føroya tann 3 juni 2018.

Nevnd: Jógvan Magnus Andreasen, formaður,

Jógvan Niclasen, varaformaður,

Oddmar Nielsen, nevndarlimur,

Jastrid Mathea Jensen, tiltakslimur/skrivari.